# Bilar til sølu

**Chevrolet Blazer Silverado 6,2 diesel**




· Árgangur 1992 · Km 111.500 · Automat gear · 4 WD
· El-rútar · 5 setur · Radio · Tónaðir rútar · Vælhildin.

**Opel Vectra 1,6 bensin st. car persónbilur**




Árgangur aug. 2001, Km 46.045 · Aircondition
· Radio · Bagaguskjúlara · Takboylar · Vælhildin.

**Renault Mégane 1,6 Coupé**




· Árgang 1996 · Km 149.000 · 1,6 bensinmotor
· Summardekk á sportfelgum · Radio og píkadekk fylgja við.

**Mitsubishi L400 TD 4WD**




Árgang okt. 1997 · Km. 90.000 · Vørubilur · Hita í setrum
· Krók · Góð heilársdekk á sportfelgum. Sera vælhildin.

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 51 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

Sosialurin 341800

## Restaurant MARCO POLO

Søkt verður eftir starvsfólki til matstovuna.

Vinarliga ring
**313430 ella 213434**

## Føroya Handilsskúli søkir eftir
# LÆRARUM OG TÍMALÆRARUM

til HH og FHS í Tórshavn og á Kambsdali frá 1. august 2004. Hevur umsøkjari útbúgving í lærugreinum, sum nøkta tørv skúlans, kann talan verða um fast starv.

Tímar eru leysir at søkja í lærugreinunum niðanfyri. Tímatølini í klombrum eru vegleiðandi og treytað av myndugleikanna góðkenning av flokkatali.

**Tórshavn:**
Altjóða búskapur B (10 t/v), Ársrokn-skapur A (5 t/v), Danskt A (9 t/v), Dekoratión (3 t/v), Enskt C (4 t/v), Fiskivinna C, B (4-8 t/v), Fyriskipan A (4 t/v), Samfelagslæra C (4 t/v), Sálarfrøði C (4 t/v), Støddfrøði D, C (10-15 t/v), Sølubúskapur B, A (4-9 t/v), Vinnulívsrættur C (9 t/v), Virkisbúskapur C, B, A (17-22 t/v)

**Kambsdalur:**
Føroyskt C/A (16 t/v), Marknaðarførsla C/A (19 t/v), Sølubúskapur B/A (18 t/v), Týskt C (4 t/v), Enskt C (8 t/v), Kunningartøkni C (12 t/v), Støddfrøði D/C (9 t/v), Altjóða búskapur B (5 t/v), Fjølmiðlakunnleiki C (4 t/v), Sálarfrøði C (4 t/v), Dekoratión (3 t/v)

**Arbeiðsuppgávur:**
- undirvísa í viðkomandi lærugreinum
- leggja til rættis undirvísingargongdir
- luttaka í toymisarbeiði
- vera við í ráðlegging skúlans
- luttaka í verkætlanum, sum skúlin skipar fyri

**Vit vænta, at tú:**
- hevur útbúgving á kandidat-stigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á A- og B-stigi.
- hevur útbúgving á bachelor-stigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á C-stigi.
- hevur áhuga í undirvísing
- dugir væl at samstarva
- dugir væl at samskifta
- vilt vera við at menna skúlan
- ikki ræðist nýggjar avbjóðingar

**Vit kunnu m.a. bjóða:**
- eitt fakligt mennandi umhvørvi
- eftirútbúgvingarmøguleikar
- eitt arbeiðspláss í støðugari menning
- góðar arbeiðsumstøður
- ein spennandi og lívligan gerandisdag
- spennandi avbjóðingar

**Setanarkor til fast starv:**
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð. Lærarar, sum settir verða í fast starv, mugu vera til reiðar at fara undir kravda námsfrøðiliga útbúgving skjótast gjørligt. Eisini mugu teir rokna við í ávísan mun at skula undirvísa á fleiri stigum og partvíst um kvøldið og á báðum handilsskúladeildunum, gerst tað neyðugt.

**Løn:**
Lærarar verða løntir í HL-lønarrensli 13/21/24, 18/26/29 ella 16/21/29/31.

**Umsókn:**
Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og skal sendast hagar, sum umsøkjarin ætlar at starvast, t.v.s. antin Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn, ella Føroya Handilsskúla á Kambsdali, 530 Fuglafirði. Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 17. mai 2004. Umsóknarblað fæst á skúlanum ella á heimasíðu skúlans www.fh.fo .

Nærri upplýsingar um størvini í Tórshavn kunnu fáast við at venda sær til Olav Absalonsen, inspektør, á telefon 317177 ella oa@hsh.fo, og um størvini á Kambsdali við at venda sær til Páll Isholm, deildarstjóra, á telefon 444900/219930 ella palli@kambsdal.olivant.fo .

*Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 200 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH) og 200 á Fyrisiting, Handli og skrivstovu (FHS). Undirvísingin fer fram í Havn og á Kambsdali. Í Havn starvast um 35 og á Kambsdali um 20 lærarar. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri fjarlestri, kvøldskúla og framhaldsútbúgvingum, so sum teldustøðingaútbúgving, Master of Management, HD, datanom, akademimerkonom og merkonom.*

## Norðoya Javnaðarfelag

Aðalfundur felagsins og fyrsti uppstillingarfundur til býráðsvali verður í Bøgøtu 3 hóskvøldið 13. mai kl. 20.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Arbeiðsfólk

Søkt verður eftir arbeiðsfólki til asfaltarbeiði. Kunnleiki til asfalt/entrepenørmaskinur er ein fyrimunur, men eingin treyt.

Áhugaði verða biðin at venda sær til Snarskivuna.

SNARSKIVAN

Sosialurin -har tað hendir



## Seteplir

| | |
|---|---|
| MARIS PIPER | 25 kg |
| SINI | 25 kg |
| RAJA | 25 kg |
| FOLVA | 25 kg |
| OLEVA | 25 kg |

## Havamold
Ymisk sløg, við og uttan gjødning, 20-150 l.

## Havakálk
**25 kg**
Fibur dúkur til at breiða yvir veltur. Sera munagott at fremja gróðurin.

## Kunsttøð
Frá Danmark størstu kunsttøðverksmiðju KEMIRA hava vit á goymslu ymisk sløg av gjødningi, eisini økologiskan gjødning. Annars hava vit á goymslu kunsttøð til eplir, gras og urtagarðsbrúk í 10-25kg og 50kg sekkjum, til sámuligar prísir. Alt á goymslu.

**Ring á tel. 313 897 • 213 897**
**Fax: 313 883**
**Avgreiðslutíðir:** kl. 08.00 - 17.30
Leygardag: kl. 10.00 - 12.00



## Forkunnugt til urtagarðin

**Róturfræ og plenugræsfræ**
Á goymslu hava vit 1. floks norskt rótafræ, plenugræsfræ og rótatøð. Mosafjernara og ókrútsfjernara.

## Snigla eitur
Fenamol - sniglaeitur er altíð á goymslu.

Goymslan er í húsinum hjá Apotekinum við Staravegin 15

Sosialurin

**P/f Jógvan Weihe**
Staravegur 15 · Tel. 313 897 · Fartel. 213 897 · Fax 313 883
Teldupostur: jwimport@post.olivant.fo · heimasíða: www.jogvan-weihe.fo

Galdandi frá 1. mai 2004

# Mykinesleiðin




| av Sørvági | | | úr Mykinesi | |
|---|---|---|---|---|
| Kl. | Dagur | Kunning | Kl. | |
| 10:00 | x67 | 1/5-31/8 | 11:30▼ | Busssamband til Sørvágs og úr Sørvági |
| 10:00* | x67 | 8/10-22/10 | 11:30▼ | Busssamband til Sørvágs og úr Sørvági |
| 15:40 | x | 1/5-31/8 | 16:55▼ | Einki bussamband til Sørvágs 15:40, men bussamband úr Sørvági 18:10 |
| 16:30 | 67 | 1/5-31/8 | 17:45▼ | Bussamband til Sørvágs, og bussamband úr Sørvági 18:50 |

* Tilkalling á tel 33 32 00 frammanundan, opið kl. 07:00-20:00.
▼ Fráfaringartíðirnar kunnu broytast munandi vegna veður og streym. Kunning um møguligar avlýsingar fæst við við at venda sær til 33 32 00.

**Frávik á leið 36**

| Dagur | Broyting |
|---|---|
| Kr. Himmalsferðaraftan | Sum fríggjadag |
| Kr. Himmalsferðaradag | Sum sunnudag |
| Hvítusunnudag | Eingin sigling |
| 2. Hvítusunnudag | Sum sunnudag |

REPROZ

Sosialurin

STRANDFARASKIP LANDSINS
www.ssl.fo · 34 30 30

# Miðnámsskúlin í Suðuroy

Treytað av góðkendum undirvísingarvirksemi verða frá 1. august 2004 nøkur størv sum adjunktur/lektari ella tímalærari leys at søkja

Tímarnir eru hesir:

**Samfelagsfrøði** 15 tímar og **tónleikur** 8 tímar.

Tímar færri enn 6 í hesum lærugreinum: **alisfrøði, evnafrøði, lívfrøði, støddfrøði, geografi, franskt, latín, leiklist** og **sálarfrøði**.

Umsøkjarar skulu tilskila, í hvørjum lærugreinum teir hava undirvísingarførleika (høvuðsgrein, hjágrein ella annað), og um teir hava námsfrøðiliga útbúgving. Umsøkjarar, ið ikki hava námsfrøðiliga útbúgving, og sum verða settir, skulu í august mánaði taka námsfrøðiligt innleiðsluskeið, sum Mentamálaráðið skipar fyri.

Skúlin fer í tilmæli sínum um setan í fast starv at leggja dent á, at umsøkjararnir hava kunnleika til føroyskt mál og føroysk viðurskifti, og um teir ikki hava tað, at teir eru sinnaðir at ogna sær innlit og vitan um hetta. Harumframt fer skúlin at leggja dent á, at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, nýggir arbeiðshættir og KT eru týðandi tættir.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um endamál skúlans við at venda sær til leiðslu skúlans ella við at vitja heimasíðu skúlans: www.midnam.fo

Starvssetanin verður sambært sáttmála millum Yrkisfelag studentaskúla- og HF-lærara (YF) og Fíggjarmálastýrið. YF-umsóknarbløð fáast frá Yrkisfelagnum ella frá skúlanum (tlf. 373622, faks 374026, e-mail midnam@midnam.fo)

Umsóknin skal **stílast til** Mentamálaráðið, men **sendast til** Miðnámsskúlan í Suðuroy, att. Ole Laursen, deildarleiðari, 900 Vágur, **í seinasta lagi 11. mai 2004.**



# BUSSAR TIL SØLU

- VW TRANSPORTER
10 pers. minibussur, árgang 1994

- VW CARAVELLE
10 pers. minibussur, árgang 1992

- SCANIA
37 pers. bussur, árgang 1979

- BOVA
49 pers. bussur, árgang 1984

Allir bussarnir eru nýsýnaðir

MOURITSEN'S BUSSAR

Ring á tel 32 21 21 og hoyr nærri

www.mb.fo